# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

*– Eftir átta kilometrar var tað, sum fekk eg ein hamara í høvdið*

*Guttorm Sørensen, rennari*

# Fyrsta gullið eftir føroyska finalu

**Alex Joensen tryggjaði Føroyum fyrsta heiðursmerki á leikunum, tá hann vann gull í einstaklingakapping í judo. Finalan var móti einum øðrum føroyingi**

JUDO
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*




*Alex Joensen í bláum vann gull í einstaklingakappingini í judo í vektflokkinum fyri menn undir 66 kilo. Í hvítum stendur hin finalisturin og silvurvinnarin Jógvan Páll Kristiansen.*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

Í Vergina Hall sum liggur skamt uttan fyri býin Falikari á eystursíðuni á Rhodos, kom fyrsta føroyska heiðursmerki í hús. Eitt heiðursmerki at besta slag og í gyltum liti, sum Alex Joensen úr Hvalvík tryggjaði Føroyum, eftir at hann hevði vunnið finaluna í einstaklingakappingini í judo.

– Hetta hevði eg als ikki roknað við. Serliga tá eg upprunaliga skuldi berjast í –73, men at vit síðani broyttu eitt sindur við vektflokkunum, og eg endaði ein flokk lægri, greiddi sjónliga fegni Alex Joensen frá, eftir at gullkrónan var komin at hanga um hálsin.

Fyri at koma niður í vektflokkin fyri tey undir 66 kilo, hevur Alex seinastu dagarnar mist trý kilo.

## Møtti gomlum liðfelaga

Tað var í vektbólkinum fyri tey undir 66 kilo, at Alex Joensen gjørdi bart. Men í sama vektflokki hevði eisini ein annar føroyingur gjørt vart við seg, so tá alt kom til alt møttust Alex Joensen og Jógvan Páll Kristiansen frá Norðskála í finaluni.

– Tað var við eitt sindur blandaðum kenslum, at eg skuldi møta honum. Vit kennast jú so væl, og av tí sama bleiv finalan ikki tann stóri dysturin. Vit vita hvat hvør dugur, kenna bestu køstini og hvat vit skulu ansa eftir, sigur Alex Joensen, sum annars er sera væl nøgdur við kappingina sjálva.

– Hetta var ein góð kapping við einum yvirkomiligum støði, kunnu vit siga nú, eftir at vit hava stúrt fyri, hvussu vit fóru at liggja í mun til hinar, sigur Alex.

## Vildu vísa seg

Tey vóru mong í høllini, sum bitu merki í, at teir allar flestu av føroysku luttakarunum vunnu sínar dystir eftir rættiliga stutta tíð. Hetta hevði eisini sína orsøk.

– Vit høvdu avtalað, at vit vildu fara "all-in" beinanvegin. Tað vil siga at satsa nógv upp á fyrstu løtuna fyri at vísa, at vit eru sterkari og ikki ræðast, greiðir Alex. Hesin valdi taktikkur hevur eisini tann fyrimun, at tá gerast dystirnir oftast stuttir, og so er meiri orka eftir til seinnu dystirnar.

## Bilsnir

Alex Joensen segði tíðliga í greinini, at hann var ógvuliga bilsin av, at gullmedaljan endaði við at hanga um hansara háls, men 24 ára gamli hvalvíkingurin er eisini bilsin av liðnum.

– Eg og restin av liðnum eru yvirraskaðir. Vit kunnu illa siga, at vit ikki høvdu væntað tað, tí vit vistu snøgt sagt ikki hvat vit komu til, men nú tað bleiv so gott tað heila eru vit allir glaðir og væl nøgdir, sigur fyrsti føroyski medalju- og gullvinnarin á oyggjaleikunum 2007.

## Broyttu skjótikappingina

Fram til sunnumorgunin hildu føroyingarnir, at Marius Joensen og Magni Dam skuldu skjóta í liðkappingini í skeet tann dagin.

Hetta varð tó broytt í evstu løtu, soleiðis at talan ístaðin gjørdist um sporting, har skotið verður í bæði skeet og trap.

Og heldur ikki tann kappingin gekk serliga væl, tí kastimaskinan ikki vildi fleiri enn 55 av teimum 100 dúgvunum avstað.

Av føroysku skjúttunum rakti Eirikur Elison 13 dúgvur. Jóannes Joensen rakti 27 dúgvur og Robert Hansen rakti 24 dúgvur.

Umframt at kastarin ikki sendi nóg nógvar dúgvur, so seinkaði hesin eisini kappingini við á leið tveimum tímum.

Marius Joensen og Magni Dam skuldu so mánadagin royna seg í liðkappingini í skeet.

**-mørk**

## Á sætta plássi

Eftir fyrsta kappingardagin á Oyggjaleikum eru Føroyar á einum samlaðum sætta plássi í heiðursmerkjarøðini. Judo-kappingarnar kastaðu heilt væl av sær, og eru hesar higar til einastu kappingar, har Føroyar hava vunnið heiðursmerki.

Støðan eftir fyrsta dagin er hendan:

| | Land | G | S | B |
|---|---|---|---|---|
| 1 | Rhodos | 4 | 5 | 6 |
| 2 | Bermuda | 3 | 1 | 2 |
| 3 | Áland | 2 | 0 | 1 |
| 4 | Guernsey | 2 | 0 | 1 |
| 5 | Prince Edward Island | 2 | 0 | 1 |
| 6 | Føroyar | 1 | 5 | 1 |
| 7 | Isle of Man | 1 | 2 | 1 |
| 8 | Cayman Islands | 1 | 0 | 0 |
| 9 | Hitra | 1 | 0 | 0 |
| 10 | Hetland | 1 | 0 | 0 |

# Sótu væl í býarkoyringini

**Eingi heiðursmerki, men føroysku súkklararnir hildu eitt javnt støði í býarkoyringini, har nakrir fínir kappingarkilometrar komu í beinini**

SÚKKLING
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Býarkoyringin í súkkling var hesa ferð flutt til fyrsta kappingardagin. Talan er annars um kapping, sum plagar at liggja allar seinast á oyggjaleikunum, men hjá súkklarunum var tó lítið annað at gera, enn at fara ígongd. Eisini hóast koyringin í evstu løtu varð flutt úr miðbýnum niðan á gamla Acropolis.

Og tað gekk nú eisini heilt hampuliga væl. Hóast talan ikki gjørdist um heiðursmerki, so vóru føroysku súkklararnir allir í høvuðsfeltinum. Fram í oddin sluppu teir tó ikki. Fýra súkklarar høvdu lagt seg fremst, og so vardu liðfelagar teirra fyri, at nakar úr høvuðsfeltinum fekk fatur á teimum.

Tí gjørdist talan at enda um spurt, har súkklari av Guernsey gjørdist fremstur. Nummar tvey varð Bermuda, og á triðja plássi kom ein Man-búgvi.

Fremsti føroyingurin var Bogi Kristiansen, ið kom á mál sum nummar 14. Hetta var í stóra høvuðsfeltinum, har Gunnar Dahl-Olsen, Eli Christiansen, Sigmund Olsson og Torkil Veyhe allir sótu.

Soleiðis var avrikið meira enn góðkent. Býarkoyringin kann ofta vera beinleiðis vandamikil, um ov nógv verður satsað, og serliga á fyrsta degnum fer hetta illa at loysa seg. Heldur ráddi um at fáa nakrar kappingarkilometrar í beinini, og tann parturin eydnaðist til fulnar. Ikki minst, tí súkklararnir eisini kendu seg heilt væl, hóast hitastigini á kvøldi liggja um tey 30.